oyggjaleikir



Hjá monnunum var Pál Joensen púrasta einaráðandi á øllum frísvimjiteinum frá 200 til 1500 metrar. Men tað kom óvart á eitt nú Jersey, at Pál eisini kundi svimja eina kanóntíð í stafettini



Føroyskt golf er aftur við á oyggjaleikum. Málið var fyrst og fremst at sleppa undan aftasta sessinum í kappingini, og hetta eydnaðist eisini hjá Jónfinn Thomassen og liðfeløgunum



Bronsan frá seinastu oyggjaleikum glapp føroysku byrsuskjúttunum av hendi, tá Marius Joensen meira enn heilkiksaði seinasta umfarið. Skjótikappingin var hálvgum kaotisk, og at enda máttu luttakararnir sjálvir taka um endan í fyriskipanini



Bert 20 sentimetrar restaðu í til silvurið. Men Heri Ziska var ovurfegin, tá hann fyri fyrstu ferð í trimum oyggjaleikum vann seg upp á heiðursmerkjaplássini í klingruvarpið